# Mál- og avrikssáttmáli millum

# Heilsumálaráðið
# og
# Fólkaheilsuráðið
# 2012

**Visión**

Fólkaheilsuráðið skal vera eitt virt og viðurkent ráð, sum er ein sjálvsagdur stuðul og samstarvsfelagi hjá øllum við áhuga fyri fólkaheilsu.

**Missión**

Fólkaheilsuráðið skal styrkja tiltøk fyri heilsufremjan, sjúku- og vanlukkufyribyrging, bæði í almanna- og heilsuverkinum. Herí er roknað at ráðgeva lands- og kommunalum myndugleikum, at ráðgeva og stuðla menningararbeiði kring landið, at taka stig til kanningar og útgreiðingar, at stimbra gransking og royndum og at skipa fyri, at ítøkilig heilsufremjandi og sjúkufyribyrgjandi tiltøk í fólkaheilsuætlan landsstýrisins verða sett í verk og framd. Viðvíkjandi beinleiðis fyribyrgjandi átøkum ber ikki til at fara eftir øllum í senn, men Fólkaheilsuráðið leggur dent á at fáa fólk at roykja minni, at røra seg meira og at fylgja teimum átta kostráðunum.

**Um Fólkaheilsuráðið**

Fólkaheilsuráðið er skipað sum eitt fakráð og ráðgevur landsstýrismanninum um heilsufremjandi, sjúku- og vanlukkufyribyrgjandi tiltøk.

Fólkaheilsuráðið hevur sum uppgávu

- at styrkja tiltøk fyri heilsufremjan, sjúku- og vanlukkufyribyrging
- at ráðgeva lands- og kommunalum myndugleikum í sambandi við heilsufremjandi og sjúku- og vanlukku fyribyrgjandi tiltøk
- at styrkja heilsufremjandi, sjúku- og vanlukkufyribyrgjandi tiltøk við ráðgeving og stuðuli til royndar- og menningararbeiði kring landið
- at taka stig til kanningar og útgreiningar, sum eiga at verða framdar sum liður í einum heildarfyribyrgingartiltaki, ella sum liður í eini meting av verandi heilsufremjandi og sjúku- og vanlukkufyribyrgjandi tiltøkum
- at stimbra gransking og royndum á fyribyrgingarøkinum
- at skipa fyri, at ítøkilig heilsufremjandi og sjúkufyribyrgjandi tiltøk í fólkaheilsuætlan landsstýrisins verða sett í verk og framd

Í Fólkaheilsuráðnum sita 7 limir. Landsstýrismaðurin velur limirnar fyri 4 ár í senn. Ein limur umboðar undirvísingarverkið, ein limur umboðar almannaverkið, tríggir limir eru heilsustarvsfólk og ein limur umboðar løgregluna. Landsstýrismaðurin velur sjeynda limin, sum eisini skal hava serligt innlit í almanna- og heilsuviðurskifti. Landsstýrismaðurin velur formann og næstformann millum limirnar í ráðnum. Ráðið hevur umleið 10 fundir árliga.

**Fíggjarviðurskifti**

Í 2012 hevur Fólkaheilsuráðið eina játtan á fíggjarlógini, sum er 1.552 tús. kr. Harumframt hevur ráðið 685 tús. kr. í eina játtan á fíggjarlógini til serlig heilsuátøk. Samlaða játtanin er 2.237 tús. kr.

**Starvsfólkaviðurskifti**

Ráðið hevur eitt skrivstovufólk i parttíðarstarvi. Harumframt hevur Fólkaheilsuráðið fólk í starvi, sum starvast í tíðaravmarkaðum størvum við ítøkiligum uppgávum. Limirnir í ráðnum eru óløntir, men fáa fundarpengar. Formaðurin arbeiðir ólønt nakrar tímar um vikuna. Fundir ráðsins liggja vanliga aftaná vanliga arbeiðstíð.

**Arbeiðsøki**

Arbeiðsøkið er m.a.

- at skipa fyri átøkum, sum hava til endamáls at betra heilsustøðuna í samfelagnum
- at taka stig til og fíggja kanningar av fólkaheilsustøðuni í Føroyum
- at fylgja við í vísindaligu fólkaheilsubókmentunum og at gera serligar niðurstøður viðvíkjandi neyðugum fólkaheilsuátøkum fyri føroyska samfelagið
- at svara spurningum frá aðalráðum og frá løgtingsnevndum bæði skrivliga og munnliga
- at svara almennum stovnum í fólkaheilsuspurningum
- at svara fjølmiðlunum, bæði skrivliga og munnliga

**Samstarv**

Meginsamstarvsstovnarnir eru Deildin fyri Arbeiðs- og almannaheilsu, Landslæknin, Heilsumálaráðið, Gigni, Skúlaverkið, Nærverkið og Mentamálaráðið. Eisini hevur ráðið knýtt samstarvsbond við Ítróttasamband Føroya.

**KT-skipanir**

Fólkaheilsuráðið er við í Landsnet.

**Framhaldandi virksemi**

*Rørsla*

Ein av størstu vandatættunum fyri fólkaheilsuna er vantandi rørsla. Í rørsluárunum 2009 og 2010 skipaði Fólkaheilsuráðið fyri fleiri átøkum fyri at fáa fólk at røra seg meira. Átøkini venda sær til øll fólk, men eru serliga ætlað at røkka teimum, sum røra seg lítið ella onki. Tað er framhaldandi neyðugt at skipa fyri tiltøkum fyri at stuðla og eggja fólki til at halda fram at røra seg, og at fleiri fólk koma í gongd. Fólkaheilsuráðið fer at hava ein virknan leiklut í sambandi við Fólkaheilsurenningina 2012, serliga við atliti til Fólkaheilsurenning kring landið og heilsukanningar.

*Útivika*

Hugskotið við Útivikuni er, at tað skal vera eitt hugtak, sum øll fólk eiga og brúka – at øll seta bilin og ganga (ella súkkla) hesa vikuna. Endamálið við Útivikuni er soleiðis at fáa fólk til at venja seg við at brúka beinini til flutning heldur enn bil. Fólkaheilsuráðið lýsir við Útivikuni í fjølmiðlum men skipar ikki fyri nøkrum tiltøkum og skal soleiðis ikki "eiga" Útivikuna. Vit skrivað fyrst teldupostar til kommunur, stovnar og størri arbeiðspláss og heita á tey um at skipa fyri tiltøkum í Útivikuni, sum er í somu viku sum fyrsti summardagur, 25. mai. Øll hesi hugskot verða so løgd á heimasíðuna hjá Fólkaheilsuráðnum sum íblástur fyri onnur. Fólkaheilsuráðið skipaði fyrstu ferð fyri Útiviku í 2009, og varð henda endurtikin í 2010 og 2011. Fólkaheilsuráðið fer aftur at skipa fyri Útiviku í 2012.

*"Heystrøringur"*

"Heystrøringur" er átak, sum Fólkaheilsuráðið og ÍSF skipa fyri í felag. Her verður heitt á ymisku ítróttafeløgini um landið um at skipa fyri átøkum, sum geva fólki og serliga ungdómi ein møguleika at royna ymsar ítróttargreinir. Endamálið er, at fólk fáa áhuga fyri ítrótti og fara at íðka onkra ítróttagrein.

*Heilsukanningar*
Í fleiri ár hevur Fólkaheilsuráðið skipað fyri heilsukanningum í sambandi við Fólkaheilsurenning. Samstarv er ment saman við Hjartafelagnum, Diabetesfelagnum, Heilafelagnum og Apoteksverkinum.

*Heilsusendingar í Rás2*
Tíðliga í 2010 varð avgjørt at gera fimleikasendingar av nýggjum, tí Kringvarp Føroya gavst at senda fimleikaløturnar. Avtala varð gjørd við tvey fakfólk á økinum, og síðani varð sáttmáli gjørdur við Rás 2 um at senda hesar 3 ferðir um dagin, hvønn dag í viku. Sendingarnar byrjaðu tíðliga í 2011 og enda eftir fyrsta ársfjórðing av 2012. Fimleikaløtan verður send saman við eini sending um heilsu. Sendingar vara 15 minuttir og verða sendar tríggja ferðir dagliga.

*Alkohol og rúsevni*
Deildin fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu gjørdi í marts 2011 eina umfatandi kanning av øllum næmingum í 9. flokki.– Fólkheilsuráðið hevur fíggjað ein part av hesi kanning, har spurt verður um teirra nýtslu av rúsdrekka og rúsevnum. Kanningarúrslitini fer Fólkaheilsuráðið at nýta í sínum upplýsandi tilfari um heilsuvandar millum tey ungu, serliga tubbak og alkohol.

Í samstarvi við Gigni skipar Fólkaheilsuráðið fyri undirvísing í 8. flokkum um rúsevni.

*Samstarv við SSP*
Í hinum Norðurlondunum hava tey í fleiri ár arbeitt við foreldranetverki við góðum úrsliti. Endamálið er, at foreldur í t.d. einum skúlaflokki skulu tosa saman um ymiskar avbjóðingar, sum t.d. happing, royking og rúsdrekka, og at tey seta felags mørk fyri børnini. Saman við SSP og Føroya Lærarafelag hevur Fólkaheilsuráðið givið út tilfarið "Samspæl", sum er ætlað sum hjálp til foreldrini at taka ymisk viðkvom evni upp, og tosa seg fram til loysnir og mørk. Fólkaheilsuráðið hevur saman við SSP gjørt faldaran "Foreldrafundir kunnu minka um drykkjuskap". Hesin faldarin er ætlaður at brúka á foreldrafundum. Hetta samstarv heldur fram í 2012.

*Tubbak*
Sambært Fólkaheilsuætlanini verður miðað eftir, at talið av teimum, sum roykja, minkar, og skipa fer at verða fyri tiltøkum til tess at røkka hesum endamáli. Við tað, at umleið ein fjórðringur av teimum vaksnu og ein fimtingur av tannáringunum roykir dagliga, hevur Fólkaheilsuráðið gjørt av at brúka meginpartin av fíggjarligu orkuni til tubbaksátøk í 2012. Hetta verður gjørt í samstarvi við uttanhýsis veitarar. Roynt verður at ávirka tey ungu, soleiðis at tey ikki byrja at roykja, at fáa tey tilkomnu at gevast við at bjóða teimum roykisteðgskeið og at ávara fólk við nýggjum áskriftum á cigarettpakkarnar.

*Teknikapping*
Í sambandi við Altjóða tubbaksfría Dagin hevur Fólkaheilsuráðið í nógv ár skipað fyri teknikapping fyri børnum. Endamálið er, at børnini gerast tilvitað um vandan við royking, og at tey kunnu taka støðu til ikki at byrja at roykja. Eisini hevur tað ávirkan á vaksin fólk at síggja, hvat býr í huganum hjá børnum og teirra hugmyndir um royking.

*Kostur*
Í nøkur ár hava tvær økonumur undirvíst foreldrum og lærarum um heilsugóðar matpakkar. Tær hava gjørt faldarar, plakatir og mateskjur við myndum. Tær hava ferðast til ymsu skúlarnar. Hetta átak fer at halda fram í 2012 til allir skúlar eru vitjaðir. Tveir av teimum trimum kostfrøðingunum,

sum stóðu fyri kostárinum 2011, halda fram við sínum arbeiði í fyrsta ársfjórðringi av 2012. Tey fara at vitja stovnar kring landið við upplýsandi tilfari, sum tey hava framleitt í 2011.

**Serlig innsatsøki í 2012**

*Kostur*

Kostárið heldur fram í fyrsta ársfjórðingi av 2012. Tveir kostfrøðingar fara at starvast 2/3 tíð hvør, eftir sama leisti sum í 2011. Dentur verður serliga lagdur á matvanarnar í barnagørðum og vøggustovum.

*Tubbak*

Í 2011 royktu uml. 25% av teimum vaksnu í Føroyum og 19% av teimum 15 ára gomlu. Hetta talið er hægri enn í grannalondunum. Sum kunnugt er royking sera skaðiligt fyri heilsuna og elvir til sjúku og deyða. Fólkaheilsuráðið ætlar at fyrireika eitt størri átak fyri at minka um royking. Í samstarvi við fyritøkur, sum eru serliga kønar innan samskifti, verður í 2012 gjørt eitt stórt átak til tess at fáa tey ungu ikki at byrja at roykja. Hetta verður gjørt við interaktivum leiki í 5. flokki og við fjølmiðlaátøkum, sum hava til endamáls at seta royking í ringt ljós. Samstundis skal skipast fyri, at roykjarar fáa møguleika at fara á skeið til tess at gevast at roykja.

*Alkohol og rúsevni*

Fólkaheilsuráðið fer at luttaka í arbeiðinum at orða ein rúsdrekka- og rúsevnispolitikk.

Í august 2012 verður árliga norðurlendska ráðstevnan um rúsdrekkapolitikk. Fólkaheilsuráðið fer at luttaka í fyrireiking av hesi stevnu og eisini luttaka á stevnuni.

**Talva 1: Framhaldandi virksemi (virksemi í 2011, og sum eftir ætlan heldur fram í 2012)**

| Øki | Evni | Endamál | Tiltøk | Viðmerkingar |
|---|---|---|---|---|
| Heilsa | Rørsla | At fáa tey, sum røra seg lítið í gerandisdegnum at røra seg meira | Skipa fyri tiltøkum<br>• Útivika<br>• Heystátakið "Heystrøringur" í samstarvi við ÍSF<br>• Heilsukanningar í sambandi við Fólkaheilsurenning<br>• Fólkaheilsurenning kring landið<br>• Dagligar fimleikasendingar í Rás2 | HMR væntar, at tiltøk verða skipa og samskipað kring alt landið |
| | Rúsdrekka og rúsevni | At upplýsa um vandan við rúsevnum | • Skipa fyri undirvísing í 8. flokkum við politisti og rúsevnisráðgeva<br>• Samstarv við SSP um upplýsingartilfar til foreldur um rúsdrekka<br>• Annað samstarv við SSP | |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| | Tubbak | At halda børnum frá at byrja at roykja | • Sjónleikur um royking í 5. flokkum<br>• Teknikapping fyri børnum í sambandi við Altjóða Tubbaksfría Dagin<br>• Onnur átøk | |
| | Kostur | At børn fáa heilsugóðar matpakkar | • Matpakkaátak í skúlunum<br>• Átak í barnagørðum<br>• Orða kost- og rørslupolitikk fyri børn í dagansing og næmingar í skúlunum | Her eigur at verða samstarva við Gigni |
| Samskifti | Heimasíða | Kunna um heilsu og fyribyrging | Nýggj heimasíða verður gjørd liðug í fyrsta ársfjóðringi | |
| | Samstarv | Fáa kunning um støðuna viðvíkjandi rúsevnum | Afturvendandi fundir við løgreglu, TAKS, Heilsumálaráðið, viðgerðarstovnar o.o. um rúsevnisstøðuna í landinum | |
| | Elektronisk journalskipan | Skal fáast at virka | Alt samskifti verður skrásett í skipanini | Frá 1. januar verður allur postur journaliseraður í elektronisku journalini. |

**Talva yvir serlig innsatsøki 2012**

| Øki | Evni | Endamál | Støða | Mál í 2012 |
|---|---|---|---|---|
| Heilsa | Kostur | Kostár – framhald í fyrsta ársfjóðringi | | Leggja til rættis og fremja átøk um kost í barnagørðum |
| | Tubbak | At fáa fólk at roykja minni | Hagtøl vísa, at talið á roykjarum aftur veksur | At gera ætlan fyri og fremja tiltøk innan tubbak |
| | Alkohol og rúsevni | Fáa fólk at drekka sum minst | Miðal fyri 2011 er mett til 6,8 litrar av reinum alkoholi fyri hvønn íbúgva yvir 15 ár.<br>Orða ein rúsdrekkapolitikk | |

**Sáttmálaskeið**
Hesin sáttmálin er galdandi fyri 2012.
Eftirmeting verður gjørd saman við aðalstjóranum í Heilsumálaráðnum á heysti 2012.

Tórshavn, tann 10. mai 2012

| | |
|---|---|
| Heilsumálaráðið | Fólkaheilsuráðið |
| Poul Geert Hansen, aðalstjóri | Pál Weihe, formaður |